# Nøvn

Fyri 50 árum síðan:

## Handilsskúlaprógv í 1960



Í 1960 tóku 32 næmingar prógv á Tórshavnar Handilsskúla. Hesi kunnu sostatt halda 50 ára jubileum í ár. Myndin er tikin í auluni í Tórshavnar Kommunuskúla.

**Næmingar í Tórshavnar Handilsskúla í 1960**
**Fremsta rað f.v.:** Hildubjørg Vesturklett, Jórun Dam Jacobsen, Marita Christiansen, Jórun Gunnarsson, Sólrun Hentze Rasmussen, Jonnvá á Steig, Kára Toftenæs og Jórun Hansen.

**Annað rað f.v.:** Elinborg Nysted Danielsen, Johanna Hammer, Nanna Poulsen, Oddvør Hansen, Eyrith Guttesen, Ása á Dul, Annika Thomsem, Johanna Gaardlykke, Sunnuva Clementsen og Jóhanna Danielsen.

**Triðja rað f.v.:** Kjartan Dalsgaard, Jógvan Hammer, Poul Johannes Lindberg, lærari, Holger Bærentsen, skúlastjóri, Jacob Wenningsted, lærari, Hans Huusgaard, lærari, Peter Højgaard Simonsen, lærari, Sofus Rasmussen og Eli Poulsen.

**Aftasta rað f.v.:** Heðin Mikkelsen, Vilmund Hvíthamar og Meinhard Hentze.

Sjey næmingar vanta á myndini, teir eru: Sigurd Carlsson, Gunvør Christiansen, Ketty Hansen, Fríðbjørg Olsen, Ottar Olsen, Judith Næs Joensen og Grimhild Mohr.

### 30 ára føðingardagur
Hósdagin 20. mai, fyllir Elvin Weihe, Runavík, 30 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 22. mai kl. 18, á Sjókaféini í Runavík. Øll eru hjartaliga væl komin.

### 60 ára føðingardagur
Leygardagin 22. mai verður Lisabett Egilstrøð Hansen 60 ár. Brunch verður á Verkstaðnum Vón, Hóvabrekka 1, á Argjum frá kl. 12.

### 60 ára føðingardagur
29. mai fyllir Magnus Hansen, Norðskála, 60 ár. Dagurin verður hildin í Eydnuni á Oyrarbakka leygardagin 15. mai frá kl. 19.

### 60 ára føðingardagur
4. august verður Heiðveig Tindskarð 60 ár. Dagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum 17. juli kl. 18. Tey ið vilja gleða Heiðveig við at koma í føðingardagin, verða vinarliga biðin um, at siga frá áðrenn 20. juni. Tlf.: 317326/264030 (Heiðveig), 277556 (Barbara), 227796 (Yvonna).

### Silvurbrúdleyp
Týsdagin 22. juni hava Bodil og Eliesar Finnsson, Hólavegur 23, Porkeri, silvurbrúdleyp. Veitsan verður fríggjakvøldið 25. juni kl. 19 á Hotel Øravík, tey ið vilja gleða okkum at koma, verða biðin at siga frá á tlf. 373860 ella 227496.

### Konfirmatión
16. mai verður **Hjørdis** Joansdóttir konfirmerað í Kvols kirke. Konfirmatiónin verður hildin í Føroyum í summar.




*Gávukekkurin verður handaður í Bowlinghøllini, f.v. Jón Haraldsen, Thorvaldur Haraldsen og Kári Enghamar frá bilstøðini Auto handa kekkin til Yvonnu Drangberg leiðara á Umsorganarheiminum hjá Bláa Krossi í Grønalíð 3*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Bowlingvinningur til Bláa Kross

Herfyri skipaði Bowlinghøllin á Hálsi í Havn fyri eini firmakapping, har vinnararnir fingu ein kekk upp á 5.000 krónur at geva burtur til eitt valgerandi endamál.

Tað vóru 10 lið sum kappaðust við trimum persónum á hvørjum liði. Liðið sum vann var eitt lið hjá bilstøðini Auto. Á liðnum vóru Kári Enghamar og brøðurnir Jón og Thorvaldur Haraldsen. Teir valdu at geva tær 5.000 krónurnar til Umsorganarheimið hjá Bláa Krossi í Grønalíð 3 í Havn.

Bilførarar hjá Auto hava annars bowlað hvørja viku, síðan Bowlinghøllin lat upp fyri umleið 10 árum síðan.